# Forkoma Páll og Gerhard samgonguni - forkoma teir eisini tunlinum til Sandoynna

HEIDI PETERSEN



Tá CHE samgongan var skipað í februar í ár, var hetta við høgum málum og við bjørtum vónum.

Høgum málum og bjørtum vónum um at útbyggja, menna og gera íløgur í allar tættir í einum framkomnum og fjølbroyttum samfelag.

Høgum málum um at flyta politiska fokus frá skattalætta til tey sum eru vælbjargað, til at bøta um livikorini hjá sosialt veikastu borgarunum í samfelagnum.

Høgum málum um at nú var liðugt at tosa um útbúgving og gransking, til at handla og satsa fíggjarorku uppá at útbúgva fólk okkara og veruliga at seta ferð á gransking í Føroyum, m.a. við at seta eitt altjóða universitet á stovn.

Høgum málum um at broyta kós á manglandi mentanar politikkinum, til nú at nýta pening til mentan og list, og síggja tað sum ein neyðug íløgu í framtíð okkara.

Men hendan samgongan setti sær eisini høg mál á samferðsluøkinum, tunlar og vegir um alt landið. Samgongan er mitt í eini tilgongd um hvussu alt hetta skal kunna bera til, men tingmenninir úr Sandoynni hótta og trampa í gólvið, rópa og garta um hvat skal vera fyrst. Tað kundu vit øll gjørt, vit hava øll okkara serynski, men trúgvi ikki vit komu nærri eini loysn tann vegin. Einasti vegur er at gera hetta í felag.

So mín niðurstøða er greið, forkoma Páll og Gerhard samgonguni, forkoma teir eisini tunlinum til Sandoynna á hesum sinni. Kunna sandoyingar liva við tí? Kunna Páll og Gerhard liva við tí?

# Skriftin á vegginum

JÓGVAN E. ÓSÁ

josa@post.olivant.fo



Er tað veruliga so galið her á landi, at ongin av okkara politikarum sær skriftina á vegginum??

Síggja teir ikki tann ovurhondsstóra trupulleika, land okkara er fer við at fáa??

Eg hugsi her um okkara fiskiflota.

Skip aftan á skip koma í havn og leggjast við kai – og fara ikki út aftur.

Og hettar eru okkara størstu og mest framkomnu skip – trolarar, uppisjóvarskip o.o.

Tey binda, tí tey ikki fáa tað at hanga saman – orsaka m.a. tann dýra oljan.

Okkara fremstu línuskip fáa ikki manning, m.a. tí úrtøkan er ov lítil.

Meðan alt hettar hendir, tosa okkara politikkara um berghol – her og har – og hettar er fremsta evni í øllum tosinum.

Orsaka at eg eg sigi tað.

Men hettar er eitt luksusproblem.

Veit eg stígi onkran á tærnar, men okkara landsstýrisfólk, Torbjørn Jacobsen og Bjørt Samuelsen áttu at arbeitt við hesum trupulleika – og áttu at tikið mest av teirra tíð.

Hvussu hjálpa vit okkara vinnu – hvussu koma vit burturúr hesum trupulleika – og hvat skal til, at okkara vinna kann framhaldandi koyra og geva yvirskot??

Eg havi ikki nakra loysn, men tey eru vald til at m.a. at finna útav hesum. Hvat við at hyggja at oljuavgjaldi ella okkurt tílíkt. Eg veit tað ikki, men okkurt má gerast.

Hettar átti at verið fremst í teirra huga – og ikki um tunnil skal gerast til Sandoyar – og/ella Skálafjarðatunnil – ella aðrir tunlar.

Hettar má og skal koma í aðru rekkju.

Politikkara elska at tosa um prioritering – raðfesting.

Nemliga – tað er rætt.

Men vinnan má og skal liggja fremst.

Atli Dam, sáli, plagdi at siga, at har ein hurð fór aftur, lat altíð ein onnur hurð seg upp.

Men her sær út til, at hurðar bara verða lætnar aftur og ongin letur seg upp.

So góðu politikkara.

Latið tunnilsprátið liggja eina tíð – og farið í gongd við at loysa tann stórsta vandan, ið er frammi í dag.

Farið í gongd við at hjálpa vinnuni.

Gera tit ikki tað, so steðgar alt upp – og so kunnu tit "skjóta ein gyltan píl" eftir tunnlunum.

Hettar er ikki eitt ynski.

Hettar er eitt krav.

# Oljan dýrkar - og hvat so?

HJALMAR N. POULSEN



Flest allir føroyingar gremja seg í hesum døgum, av tí at oljan er blivin so hundadýr, at hon slær botnin undan vælferðini í samfelagi okkara.

Reiðarar leggja skipini, tí tað loysir seg ikki fíggjarliga at fiska, orsaka av høgu oljuprísunum. Okkara høðusvinna svøltar. Føroyska livibreyðið verður við skerdan lut til skaða fyri alt samfelagið.

Flest allir føroyskir politikarir eru í døpurhuga av negativu gongdini. Innast inni tó glaðir yvir at oljuavgjaldið og mvg av olju hóast alt dagliga økist, so einvegis pengastreymurin í landskassan støðugt veksur, og vit vónandi framyvir hava nakrar krónur at bora unditsjoatunnlar fyri, til gagns fyri at sitandi samgonga kann verða lív lagað. Men tá krubban tømist, bítast hestarnir....

Slíkt møsn kundi verið sagt eitt sindur ørvísi: Tit klára ikki at halda tey lyftir, tit lovaðu. Tit orka ikki at eta bitan, tit fingu tykkum undan valinum. Og fylgjurnar eru hareftir. Fyri ikki at verða skírdir orðloysingar hava tit nú givið misfostrinum søtmeti á tátuna, so arbeiðsfriður vónandi aftur valdar á politiskum plani til komandi ólavsøkutingsetu.

Harmuligt hóast alt, at ikki verður hugsað meir um bleytu virðini í relatión til slíkar undirskotsforrætningar. Er samgongan ikki meira verd enn so, hevði tað verið nogv betur um hon var deyðfødd. Tit áttu at tikið í egnan barm og latið undirsjóartunlar ligið til privata fyritaksemið og havt meira samfelagsfremjandi hugsunarhátt. Er tað nú so, at ein undirsjóarverkætlan er burðardygg, so lat fyritaksemið fara á privatar hendur. Lat "Darwins doktararitgerð" koma til sín rætt í júst hesum máli.

Hugsið meira um bleytu virðini, tí her er nógv at tríva í. Um ikki so gev skarvin yvir, meðan væl er.

# »Hvat heldur tú um føroyingar Føroyar«

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



Sang Steintór Rasmussen í Læraraskúlahøllini í kvøld, nú Tjóðveldisflokkurin fyllir 60 ár. Fyrstu ferð Tjóðveldisflokkurin stillladi upp hevði hann tveir tingmenn, og í dag er hann størsti flokkur á tingi. 8 tingfólk og einasta tingmanning við javnstøðu bæði í ting og -landsstýrismanning. Hetta er at fegnast um, hóast ynskiligast kortini hevði verið, at als eingin tørvur var á Tjóðveldi, tí vit høvdu rokkið málinum um eitt frælst Føroyaland. Men so er ikki – ikki enn!

Seinastu tíðina hevur kjakið í stóran mun snúð seg um tunnlar. Fari ikki at nýta orku upp á tað kjakið júst her, men lata arbeiðsbólkin fáa arbeiðsfrið fram til ólavsøku. Og vit vita jú øll, at almikið av øðrum álvarsmálum og íløgum nú mugu fáa rúmd í kjakinum eisini.

Tað sum ger meg upplyfta nú í kvøld, eru mergjaðu røðurnar og tónleikurin, eg legði oyrað til á kvøldsetuni í læraraskúlahøllini í kvøld í samband við 60 ára føðingardagin.

Í kvøld savnaðust vit um felagsmál okkara – LOYSING!

Tað gleðir meg, styrkir meg og fløvar meg, tá vit tosa um tað sum bindur okkum saman, heldur enn tað sum skilur okkum. Fjølbroytni er ein av okkara størstu styrkjum. Hvussu varð vorðið her á landi, um øll hugsaðu júst sum tú ella eg? Fínasta slag, eina tíð, men í longdini lítið mennandi, ikki so? Nei, framburður og menning finnur stað, tá vit hóast fjølbroytni, ólíkan hugburð og hjartamál evna at koma framá.

Men gakk sum tað kann vera trupult!

Beint nú fegnist eg um mergjaða íblásturin eg fekk í kvøld, meðan eg hugsi um, at eg gleði meg at sleppa at arbeiða við nøkrum av teimum málunum sum eg sakni SO at tríva í!

# Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**25. partur**

Mika profeterar eisini um Messias. Men tú Betlehem, Efrata, sum so lítið hevur at týða til at vera millum túsund Juda! Úr tær skal ein ganga Mær út, sum skal vera høvdingi Ísraels. Uppruni Hansara er úr forðum, frá fortíðardøgum.

Tí gevur Hann tey upp til vanlukku inntil ta tíð, táið hon, ið eiga skal, hevur átt; og teir, ið eftir eru av brøðrum Hansara, skulu koma heimaftur til Ísraelsmenn.

Hann skal í kraft HARRANS, í høga navni HARRANS Guds Síns, standa og røkta fylgi Sítt; og tey skulu sita í friði; tí nú skal Hann vera stórur líka at endum jarðarinnar Mika 5,1-3.

Her er týðuligt , eins og hjá t.d. Esaias kap. sjey og níggju og fimtitriðja, talan um Jesus av Nazaret. Hesin, sum kemur úr Betlehem, er frá fortíðardøgum. Tað var eisini tað, sum Jesus segði við jødarnar um seg sjálvan. Hann segði: "Áðrenn Ábraham varð til, eri Eg!" Jóh. 8,58.

Annars er at siga um Mika at hann hevur sama boðskap sum hinir. Vit hava sæð, hvat hann talar til Ísrael um teirra syndir. Og fimti kap. endar við at , Harrin skal hevna seg á heidningafólkini, sum ikki hava vilja hoyrt. Í sætta kap. lesa vit um, at Harrin hevur opinberað menniskjum, hvat gott er, vers 8. Sjeyndi kap. byrjar við, hvussu spilt fólkið er. Gudloysi ræður. Men 7.-9. vers ljóða soleiðis:

Men eg skal skoða út eftir HARRANUM, bíða eftir Gudi frelsu mínar; Gud mín skal hoyra meg.

Gleð teg ikki uppi yvir mær, fíggindi mín! Um eg so eri fallin, komi eg aftur á føtur; um eg so siti í myrkri, er HARRIN ljós mítt.

Vreiði HARRANS skal eg bera - tí eg havi syndað móti Honum - inntil Hann flytur mál mítt og hjálpir mær til rætt mín; Hann skal leiða meg út í ljós, eg skal við gleði skoða rættvísi Hansara. Mika 7, 7-9.

Tað ber til at óttast Gud mitt í gudloysinum, sum er rundan um okkum. Og er man fallin, so ber til at koma aftur á føtur. Harrin skal leiða tey út í ljós, sum kalla á hann.

Næstur Mika er, sum kunnugt, Nahum.

**Framhald**